# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Heilsutrygd og Heilsumálaráðið

# 2014




HEILSUMÁLARÁÐIÐ & heilsutrygd

## Inngangur

Við hesum verður gjørdur Mál- og avrikssáttmáli millum Heilsutrygd og Heilsumálaráðið fyri árið 2014.

Mál- og avrikssáttmálar eru áður gjørdir fyri árini 2011, 2012 og 2013.

Heilsutrygd varð sett á stovn hin 1. januar 2010. Heimildin er í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009. Heilsutrygd er skipað sum sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum.

Heilsutrygd er almenn heilsutrygdarskipan, sum skal tryggja øllum borgarum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

Tann 1. oktober 2013 yvirtók Heilsutrygd fyrisitingina av Kommunulæknaskipanini.

# Mál og avrik í árinum

## 1. Gera 12 fráboðaðar eftirlitsvitjanir hjá veitarum

Ætlanin er at gera 12 fráboðaðar eftirlitsvitjanir hjá veitarum í árinum. Hugsað verður her um t.d. kommunulæknar og fótarøktarar.

Kostnaður: Avmarkaður til nakað av ferðapeningi.

## 2. Kommunulæknaskipanin

Luttaka í arbeiðinum at fremja tillagingar í galdandi setanar- og lønarviðurskiftum hjá heilsustarvsfólkun samsvarnadi umskipanini frá kommunulæknaviðtalunum til heilsudeplar.

## 3. Yvirtaka umsiting av profylaksum

Nýggja avrokningarskipanin við kommunulæknar er sett sum fokusøkið í 2014, og er ein avgjørd fortreyt fyri at flyta umsitingina av profylaksum til Heilsutrygd.

Talvan niðanfyri vísir hvat virkemi játtan er til í 2014.

| **Profylaksar - virksemistøl 2012-2014** | | | |
|---|---|---|---|
| | **R2012** | **J2013** | **J2014** |
| Koppsetingar | 10.367 | 12.500 | 12.300 |
| Gitnaðarfyribirging | 2.215 | 2.600 | 2.600 |
| Heilsukanningar av barnakonum | 2.125 | 2.200 | 2.200 |
| Læknakanningar av børnum | 3.721 | 4.250 | 4.250 |

## 4. Eftirmeting av læknavaktini

Heilsutrygd yvirtók fyrisitingina av Kommunulæknaskipanini 1. oktober 2013. Í hesum sambandi yvirtók Heilsutrygd eisini arbeiðið við at samskipa árligu eftirmetingina av læknavaktini. Tí verða í Mál- og avriksáttmálan 2014 sett hesi punkt, sum Heilsutrygd hevur ábyrgd av at fremja:

- At samskipa arbeiðið við at eftirmeta Læknavaktina og dagføra mannagondir
- At gera uppskot um, hvørt starvsfólkaorkan, sum tengd er at Læknavaktini, kann nýtast skilabetri enn undir galdandi skipan
- At skipa fyri evnisdegi fyri teimum sum starvast í ella saman við Læknavaktini

## 5. Sáttmálasamráðingar

Heilsutrygd skal gera upplegg/tilmæli um at simplifisera ásetingar í sáttmálunum, har Heilsutrygd hevur gjørt viðmerkingar um at tað kann verða trupult/tungt at umsita td. Tannlæknavitjanir.

Í 2014 skal Heilsutrygd luttaka í arbeiðinum at fáa sáttmálarnar við Serlæknafelag Føroya og Føroya Tannlæknafelag avgreiddar.

# Sáttmálaskeiðið

Hesin sáttmálið er galdandi fyri árið 2014.

Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2014.

Tórshavn, tann 2014

| | |
|---|---|
| Heilsutrygd | Heilsumálaráðið |
| ______________________________ | ______________________________ |
| Jan Danielsen, stjóri | Turid Arge, aðalstjóri |